


Bilboksing verður á Sandinum kl. 18 leygardagin







*Til festivalin er komin ein flottur sergjørdur lastbilur, sum verður avdúkaður leygardagin*

# Trucker Festivalurin 2009

Trucker Festilavurin hevur verið eitt afturvendandi tiltak síðan 2003. Tey fyrstu árini í Runavík, men í fjør flutti festivalurin til Klaksvíkar. Í ár verður truckerfestivalurin hildin samstundis sum noðroyastevnan er.

Nógvir eigarar og bilførarar av lastbilum hava luttikið á Trucker Festivalunum, og hevur hetta ført til eina ávísa kapping um at hava teir flottastu og mest væl hildnu bilarnar. Steyp verða givin í teimum ymisku sløgunum av stórum bilum.

Til festivalin er komin ein sonevndur showbilur. Talan er um flottan sergjørdan lastbil, sum fyrstu ferð verður avdúkaður, tá festivalurin byrjar.

Truckerfestivalurin er við í norðoyastevnuskránni, og skráin fyri festivalin sær soleiðis út.

Norðoyastevnuaftan kl. 11 byrja bilarnir at møta á festivaløkinum, og kl. 14 byrjar sjálv framsýningin. Suppa og grill verður á truckerøkinum kl 14.30, og kl. 15. verður atkvøðugreiðsla, har fólk hava møguleika at stemma upp á bilarnar. Bilboksing verður á Sandinum kl. 18.

Sunnudagin, norðoyastevnudag 7. juni, byrjar framsýningin kl. 14, og kl. 14.30 verður suppa og grill á økinum. Hallur Joensen syngur á truckerøkinum.kl. 15, og kl. 16 endar atkvøðugreiðslan um flottastu bilarnar. Steypahandanin verður kl. 17, og kl. 18 koyra bilarnir í konvoy úr Klaksvík.

**mg**



*Hallur Joensen fer at syngja á truckerøkinum*

Sosialurin